## VIÐMERKINGAR

# Er ríkisfelagsskapurin ikki til?

**Birgir Mohr**



Ein av fremstu og ídnastu ryggklapparum hjá fullveldisfólkunum í Tinganesi sigur í drúgvari grein, at ríkisfelagsskapurin við Danmark í veruleikanum ikki er til? Strudsurin stingur høvdið í sandin og heldur, at so sær eingin hann?

Slíkur pástandur er at venda upp og niður á veruleikanum anno 2001. Ríkisfelagsskapurin hevur verið í meira enn 600 ár, og tað átti ein framstandandi politikari frá sjeyti- áttati- og nítiárunum at vita alt um.

Hettar er annars sami ryggklappari, sum gav landsstýrinum ráðini, at tað var genialt at fara til Danmarkar at krevja loysing her og nú, meðan danir skuldu gjalda nógv ár framyvir.

Úrslitið av slíkari tápuligari politiskari herferð og ráðgeving, ja, tað kenna vit í dag. Kunna vit tí eisini fullvæl meta um nýggjastu ráðini frá harra Sundstein, fyrrverandi løgmanni, fíggjarmálaráðharra, løgtingsmanni og statsgóðkendum grannskoðara. Tey eru lítið verd, men kanska skaðilig.

Nei, samgonguflokkarnir gjørdu ein stóran politiskan brølara, tá tey vóru á Christiansborg fýra ferðir og gjørdu okkum føroyingar fyri skommum og til láturs. Tað er veruleikin í dag. Tey vistu, áðrenn tey fóru, at svarið var: ja til fullveldið har og nú við 4 ára skiftistíð. Samgongan tordi ikki at taka av hesum tilboði – tað hevði eg og fleiri onnur heldur ikki tora.

Heimafturkomin av 4. fundinum mátti løgmaður ásanna, at teir báðir stóru andstøðuflokkarnir høvdu haft rætt alla tíðina, tá teir ávaraðu um, at politikkurin hjá varaløgmanni á hesum øki bar ikki til.

So var nýggj framferð proklamerað longu úr Keypmannahavn. Vit skuldu hava fólkaatkvøðu 26. mai 2001 kom seinni fram. Vit sukkaðu troytt, men nú fingu vit so at kenna fólksins vilja. Men gakk, tey tordu ikki so frægt sum at spyrja. Nýggj kreppa í samgonguni, nýggj framferð. Fóru undir at yvirtaka málsøkir upp á samliband og senda pening aftur til Danmark í nógvum hundrað millióna upphæddum. Hetta gera nú somu flokkar, sum í áravís hava pástaðið, at vit áttu hendan pening fyri herverandi NATO-støðir o.m.a. Óskiljandi framferð. Hettar var so eisini ein sápubløðru-pástandur hjá loysingarmonnum, sum nú er sleptur.

Hettar maratonløpið av yvirtøkum, (fólkakirkjan er eitt dømi herum), er nú við at vera framt, uttan at fólkið er spurt herum. Eingin flokkur talaði um at minka blokkin til seinasta val – øll talaðu um, at vit áttu at fáa meira pening úr Danmark (millum annað í samband við Føroya Banka málið), og tað var eisini tað fyrsta landsstýrið gjørdi í Danmark, at hækka blokkin og biðja um meira pening? Tað var í 1998. Men nú?

Tað er longu sjón fyri søgn, at nýggi politikkurin kemur okkum aftur um brekkur, men nú er ár 2001 – soleiðis roynast álitisfólk! Hvat er broytt so nógv síðan 1998?

Jú harra Sundstein, ríkisfelagsskapurin er til og hevur verið okkum til fyrimuns einamest síðan heimastýrislógin kom í 1948. Og tað ber veruliga til at gera eina avtalu um sjálvstýri við Danmark, sum røkkur frameftir og steðgar hesum ógvusliga og orkukrevjandi klandrinum um loysing contra samband.

Tá heimastýrislógin varð gjørd í 1948 kendi eingin í verðini til slíka lóg – slíka skipan. Men væl bar til kortini. Men sjálvandi skulu vit ikki gera lógir og avtalir, sum galda fyri alla framtíð.

Tó, so leingi vit føroyingar ikki hava fingið fyritreytirnar fyri fullum sjálvstýri ella fullveldi upp á pláss – bæði fíggjarliga og umsitingarliga, ber til at hava eina sjálvstýrisavtalu við Danmark, sum peikar frameftir móti sjálvbjargni og fullum sjálvstýri uttan at vit hava slitið ríkisfelagsskapin og mist teir fyrimunirnar, hesin gevur okkum.

Tá vit hava fingið fyritreytirnar upp á pláss, um eini 15-25 ár, tá og fyrst tá, er aktuelt at taka støðu til loysing ella samband – til ríkisfelagsskapin og av teimum føroyingum, sum tá liva.

Vit eiga ikki at leypa framav, sum hendan samgongan gjørdi. Nei, vit eiga at fremja tilgongdina til sjávlbjargni og sjálvstýri varisliga og í góðum samstarvi við danir, sum tað sømir seg tveimum mentaðum fólkum og tjóðum.

# Í hjørtum okkara býr frælsi!?

**Eivind Jacobsen**
*Strendur*



Tjóveldisflokkurin hevur tikið patent upp á frælsi. Av einari ella aðrari orsøk hava teir fingið nógv (ung) fólk at trúgva, at teirra uppfatan av frælsi er tann einasta rætta. Men frælsið og frælsi er ikki tað sama. Tað frælsi teir tosa um er politiskt frælsi. Rætturin at avgerða alt við lóg. Vanligi føroyingurin hugsar meira um persónliga frælsi.

Í dag kann løgtingið avgera nærum alt. Burtursæð frá at bjóða Amerika í kríggj ella einari flagstong í New York er trupult at fáa eyga á veruligar avmarkingar í okkara politiska frælsi. Tað ræður altíð um at fáa sum mest burtur úr teimum møguleikum sum eru, til gagn fyri land og fólk. Tað krevur nevniliga format.

Higartil hevur samgongan megna at fornerma útlendingar hvørja ferð teir hava sitið til samráðingar. Vit kunnu ímynda okkum, hvussu nógv lond ynskja at verða vinir við fullveldi Føroyar og sitandi Landsstýri! Næst eftir Frankaríki verða vit heimsins ringast dámda fullveldi.

Annars lærdu vit í samfelagsfrøði, at lond hava ikki vinir. Lond hava áhugamál!! Tí mást tú hava okkurt at bjóða, um tú skalt fáa nakað. Tá er talan um javnbjóðis samráðinar.

Tí kunnu vit bert staðfesta, at samgongan ynskir evsta vald uttan nakra orsøk. Ber magtgirnd, uttan fyrilit fyri fólkinum, sum í hesum landi býr.

**Persónligt frælsi**
Øll góðtaka at avmarka frælsi á einum øki, fyri at fremja størri frælsi á einum øðrum. Ferðslulógirnar virka á hendan hátt. Hin einstaki verður avmarkaður, fyri at heildin skal kunna flyta seg á bestan hátt í ferðlsluni. Um vit gjørdu sum best ber til, kom eingin fram, fyri ikki at tala um skaðarnar av púra frælsari koyring.

Vit ynskja, at øll skulu verða líka fyri lógini. Tó gjalda øll ikki eins í skatt. Hvørki í krónum ella prosentum. Men vit góðtaka øll hetta prinsipp til frama fyri tey veikastu.

Tó kann nevnast, at tey brekaðu helst eru tey, sum hava minst frælsi. Hjá teimum er ein trappa ella kantur, ein størri forðing fyri frælsi enn vit onnur ímynda okkum. Verri er, at vit hava stórri tolsemi at góðtaka avmarkingar í frælsinum hjá hesum fólkum enn gott er.

Frælsi eigur at metast í mun til ófrælsi. Tann ið ikki kennir ófrælsi, kennir heldur ikki frælsi. Í dag hava vit einki ófrælsi í Føroyum, ið stends av stjórnarstøðuni, ella sum kann bøtast við at broyta stjórnarstøðuna.

Tjóðarfrælsi er eitt annað hugtak. Føroyar verða ikki eitt frælsari land at búgva í, um vit taka loysing. Tó kunnu onnur argument verða fyri loysing, men hava tey als einki við frælsi at gera.

**Fleiri fyrimunir enn vansar**
Samgongan ynskir, at avreiða allar fyrimunir í Ríkisfelagsskapinum, fyri eitt sera avmarka politiskt frælsi. Eitt frælsi, har avleiðingin fyri vanliga føroyingin er, ein munandi avmarking í persónliga frælsinum. Tí kann veljarin avgera, um hann vil geva stóran part av sínum persónliga frælsi, afturfyri at Høgni og Anfinn fáa so at siga einki politiskt frælsi.

Sambandsflokkurin hevur altíð sett fólki fremst og tí hava vit ikki trupulleikar, við at verða í Ríkisfelasskapi. Vit meina, at vit hava nógv stórri frælsi innanfyri enn uttanfyri. Sambandsflokkurin hevur altíð og fer altíð at gera tað, sum tænir fólkinum best. Í hjørtum sambandsmanna býr veruligt frælsi.

# Pátrúgv

**Zakarias Wang**



Tá vit vóru børn, fingu vit at hoyra søgur um mangt, sum ikki var til, og sum ikki var sannleiki. Skaðin av hesum var tó ikki stórur, tí tað vaks um okkara ímyndingarevni, og so hvørt vit gjørdust størri, lærdu vit at skilja millum alt hetta tvætlið, vit høvdu hoyrt, og veruleikan, og so kundu vit standa okkum í tí veruliga heiminum.

Men tíverri er tað viðhvørt, at vit í okkara vaksna lívi ikki megna at skilja millum uppspuna og veruleiki. Tá kann ringt spyrjast burtur úr.

Eitt dømi um hetta er tað sum føroyingum hevur verið fyri í spurninginum um donsku veitingarnar til Føroya.

Her hevur tað hóvað nógvum politikarum at billa vaksnum fólkum inn, at hesar veitingar hava verið til gagn fyri Føroyar.

Fyri nakrar av hesum politikarum kann berast í bøtuflaka, tí teir hava ikki petti av skili upp á búskaparlig viðurskifti, tí teir halda at samfelagið bert er eitt sjálvtøkuborð, har ein og hvør kann fáa ókeypis morgunmat. Hetta gongur jú fint, sum maðurin segði tá hann var dottin út av 20 hædd og kom fram við tí fjórðu hæddini.

Men at ein maður sum Edmund Joensen, sum í sínum dagliga virki er vinnulívsmaður og tí skuldi vitað, at tað er framleiðslan, sum er grundarlagið fyri tilveru okkara, og at hon er í kapping við aðrar fyritøkur og onnur lond, skal siga seg trúgva upp á jólamannin, tað er heilt ótrúligt at hoyra.

Tíbetur eru tað sjálvt í flokkinum hjá Edmund nøkur, sum duga at skilja, at hetta er fullkomuliga burturvið. Unga Sambandið hevur prógvað, at teir hava skilt hvussu tann veruliga verðin er skrúvað saman og hava tí kravt, at danski stuðulin til Føroyar skal avtakast.

Um so er, at hetta gerst poltikkur sambandsflokssins, og Edmund og aðrir sambandsmenn vilja samstarva um ein politikk, sum byggir á veruliga grund, so hevði borið til at fingið eina breiða semju um búskaparpolitikkin í Føroyum.



Mortan Johannessen eftir vitjan á Sovereign Explorer:

# Stór uppliving – sum á skipsdekki

OLJULEITING
Jan Müller

Tað er sum ein lítil føroysk bygd – bara langt til havs. Boripallurin Sovereign Explorer, sum borar eftir olju fyri eitt nú føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni, liggur skamt frá føroysk-bretska markinum, bert fáar fjórðingar frá einum heilum býi av oljupallum á bretskum øki, ið framleiða og leita. Hesir síggjast við berum eygum frá Sovereign Explorer, sum roynir at finna fyrstu føroysku oljuna. So tætt upp at kendum oljuleiðum leitar føroyska felagið eftir olju.

Fyri føroyska sjógarpin Mortan Johannesen er hesin dagurin - týsdagurin 6. november -nakað heilt serligt. Umboð fyri føroysku pressuna eru saman við nevndarlimum og starvsfólki hjá føroyska oljufelagnum, Atlants Kolvetni farin við eini av risastóru superpuma tyrlunum hjá bretska flogfelagnum Bristow longu leiðina út á feltið – “olju”-feltið. Mortan Johannesen, sum alt sítt lív hevur balst á havinum eitt nú í Barentshavinum, har hann og aðrir hava fingið mangan góðan fongin til lands, bíðar nú í spenningi eftir einum øðrum slag av fongi – møguliga nýggja tilfeingi føroyinga - oljuni og gassinum, sum kanska liggur fjalt niðri í tí myrka dýpinum.

Hóast hugurin altíð hevur staðið til fiskivinnuna, so helt Mortan Johannesen áheitanina frá einum øðrum kendum vinnulívsmanni, Poul Mohr, stjóra á Tórshavnar Skipasmiðju, um at vera við til at stovna eitt føroyskt oljufelag, verða so mikið áhugaverda, at hann gjørdi av at fara uppí verkætlanina við fullum huga. Í dag er Mortan ein av nevndarlimunum í Atlants Kolvetni, har meira enn 2000 føroyingar eru partaeigarar. Og nú leiðin gongur út á “oljufeltið Marjun” saman við Poul Mohr, nevndarlimi, Wilhelm Petersen, stjóra og Fíu Petersen, skrivara, er Mortan spentur, tí hetta er fyrsti túrurin út á ein oljupall. At hesin so bæði er í føroyskum sjógvi og at føroyska oljufelagið er partur av boringini og at útlit kunnu vera til, at júst hesin pallurin verður tann fyrsti til at finna olju við Føroyar, ger ikki støðuna minni spennandi.

Umborð á pallinum er høvi at síggja, hvussu riggað verður til at fara undir aftur boringina, nú steðgur hevur verið í orsakað av ringum veðri og serstøkum mátikanningum, sum eru gjørdar í holinum. Umstøður eru eisini til at hitta føroyingar, ið arbeiða umborð. Sum skilst á stjóranum hjá Amerada Hess, Ben Arabo, ið er ferðaleiðari, eru teir í The Faroes Partnership samtakinum við at koma á mál við boringini. Borað verður í mesta lagi í eina viku aftrat. Møguliga fæst okkurt at vita um úrslitið av boringini seinast í vikuni ella í næstu viku. Hetta eru so eisini boðini, ið fólkini frá Atlants Kolvetni fáa.

Eftir stutta steðgin á pallinum hitta vit ein rættiligan opinskáraðan og vælnøgdan Mortan Johannesen. – Hetta hevur verið sera stór uppliving og hevur tað verið ein ikki sørt løgin kensla at skula fara umborð á boripall, ið arbeiðir í føroyskum sjógvi. Mortan, sum sjálvur hevur verið siglandi maður alt sítt lív, sigur, at tað kendist sum at vera umborð á einum øðrum slag av skipi við stýrihúsi, radari og aðrari skipsútgerð. Ja, tað var sum at vera á skipsdekki aftur, nú pallurin rullaði eitt sindur í tungu alduni.

Mortan er tolin maður og tí hevur tað ikki so stóran skund fyri hann, um olja verður funnin her og nú ella í næstu framtíð. Hann vísir til tað íslendingar plaga at taka til, nevniliga, at “Tað kemur í ljós” - um tað er nakað ella einki. Hann viðgongur, at man er sjálvandi spentur, um tað verður funnið nakað nú, men man má vera fyrireikaður, at tað kann ganga báðar vegir. – Er eingin olja, ja so tekur man tað, sum tað er. Og verður olja, so gleðist man yvir tað. Um brúk er fyri olju at fáa vinnutólini at mæla víðari veit Mortan ikki, men hann dylur heldur ikki fyri, at verður nakað, so verður tað áhugavert fyri okkara samfelag, tí tað trongist jú alla staðni rundan um okkum.

Poul Mohr, sum eisini varð við á pallvitjanini, er heldur fáorðaður (!) men sigur, at tað er ein serstøk kensla at fara umborð á ein boripall, sum borar á okkara egna øki. –Júst tað haldi eg verða ógvuliga áhugavert, og hvat síðani kemur burtur úr, vil tíðin so vísa. Poul Mohr er ein av teimum vinnulívsmonnunum her á landi, sum hevur fylgt oljutilgongdini frá byrjan. Hann var ein av monnunum, ið tóku stig til at stovna Atlants Kolvetni, so eisini hann er spentur at frætta um úrslitið av hesi fyrstu boringini hjá felagnum.



*Mortan Johannesen her saman við Poul Mohr og Wilhelm Petersen, allir frá Atlants Kolvetni*
*Mynd Jan Müller*



*Mortan Johannesen og Poul Mohr, nevndarlimir í føroyska oljufelagnum, fyri fyrstu ferð á palli, sum borar á føroyskum øki. Aftanfyri: Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess*
*Mynd Jan Müller*



*Føroyski kokkurin Leif Petersen hevur nógv gott at bjóða Mortani og restini av føroyska ferðalagnum*
*Mynd Jan Müller*